## Nugent til Portsmouth

Í síðstu viku boðaði Preston frá, at teir høvdu tikið av boðum frá tveimum liðum í ensku Premier League uppá teirra stjørnuáleypara, David Nugent. Og eftir øllum at døma hevur enska Premier League felagið, Portsmouth, nú vunnið dystin um Preston-áleyparan, sum fekk debut á enska landsliðnum fyrr í ár. Prísurin fyri 22 ára gamla ensla áleyparan er sum skilst góðar 75 mió. kr., og venjarin hjá Portsmouth, Harry Redknapp er væl nøgdur. – Hann er ein av teimum fáu áleyparunum í lægru deildini, sum fer at klára seg í Premier League.



## AGF brynjar seg

Komandi kappingarár er AGF aftur at finna í Superliguni, og liðið er so smátt farið at styrkja seg til at kunna fóta sær í deildini. Nýggjasta keypi er sterki og kviki høgrivongurin Alex Valencia, sum hevur verið liðfelagi hjá Toda Jónsson í norska IK Start. 27 ára gamli Valencia, ið eisini hevur roynt seg á norska landsliðnum, hevur fingið sáttmála við felagið fram til 2010.



*Sundabáturin styrkti um sína støðu í FM-stríðnum, tá teir fingu sín triðja sigur á árinum í Fuglafirði. Samstundis endaði Tvørabáturin á triðja plássi, so nú eru seks stig á muni í FM-kappingini.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Endaspurturin aftur avgerandi

**Sundabáturin vann fyri triðju ferð í ár hjá 6-mannaførum við monnum, og aftur hesa ferð settu teir alt upp á pláss í endaspurtinum í harðari kapping við Stráluna, sum tykist hava funnið stevið eftir eina heldur trilvandi byrjan**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Kappingin hevur verið sera hørð fyrstu tríggjar róðrarnar hjá 6-mannaførum við monnum, og tað eru serliga Sundabáturin og Tvørabáturin, sum hava borga fyri einum spennandi kappingarári.

Undan Varmakelduni lá Sundabáturin trý stig framman fyri Tvørabátin í FM-stríðnum, og enn einaferð var lagt upp til eitt rættiliga stríð í millum hesar báðar bátarnar.

Soleiðis skuldi tó ikki blíva á Varmakeldu. Tvørabáturin hevði ávísar trupulleikar at fylgja við, og í staðin var tað Strálan, sum gav Sundabátinum harða kapping.

### Væl nøgdir sundamenn

Sum ikki einaferð gjørdist endaspurturin hjá Sundabátinum avgerandi á Varmakeldu, tí har megnaðu teir at økja nakað um munin niður til Stráluna, so sigurin ongantíð kom rættiliga í vanda.

- Ja, í endaspurtinum eru vit sterkir, og hesin avgjørdi helst enn ein róður til okkara fyrimun leygardagin, segði bátsformaðurin hjá Sundabátinum, Hjalmar Zachariassen, tá vit fingu orðið á hann.

Hann segði annars, at teir sum heild vóru avbera væl nøgdir við róðurin.

- Vit eru sera væl nøgdir. Vit væntaðu faktiskt ikki so harða kapping frá Stráluni, men vit vistu, at teir vóru góðir, og hetta vístu teir eisini á Varmakeldu.

Hjalmar gleddist annars um, at Strálan var komin betri við í kappingini, tí hetta styrkir um FM-støðuna hjá Sundabátinum.

- Ja, tað hevur stóran týdning fyri okkum, at Strálan bleiv nummar tvey, tí nú fóru vit longur frá Tvørabátinum í FM-stríðnum, har tað nú eru seks stig á muni.

# Eysturoyingur



**Fýra róðrar og fýra sigrar. Eysturoyingur hevur ikki latið nakran iva vera um, hvør bátur er sterkastur hjá 10-mannaførunum, og á Varmakeldu var aftur meir enn ein bátslongd á muni niður til Vestmenning á øðrum plássi**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Gula flaggskipið í Runavík, 10-mannafarið Eysturoyingur, hevur, síðani hann bleiv gjørdur, verið við til at mynda oddin í føroyskum kappróðri. Mest sum á hvørjum ári hevur Eysturoyingur verið við heilt frammi í oddinum, og í so máta er árið í ár einki undantak.

Eysturoyingur hevur vunnið fýra teir fyrstu róðrarnar á árinum, og hvørki Vestmenningur ella Havnarbáturin hava klárað at hótt Eysturoyingin nevnivert. Vestmenningur hevur roynt, men sjálvt um tíðirnar hava verið betri hjá honum, so hava teir tó enn ikki verið heilt tætt við at steðga sigursrøðini hjá Eysturoyingi.

Sannleikin av tí heila er, at Eysturoyingur hevur verið framúrskarandi hjá 10-mannaførunum, og har skal nakað heilt serligt til frá hinum bátunum, fyri at teir skulu hótta flaggskipið hjá runavíkingum.

### Betri at vunnið seinastu ferðirnar

Eftir fjórða sigurin í ár á Varmakeldu í Fuglafirði leygardagin fekk Sosialurin eitt prát við bátsformannin á Eysturoyingi, Ludvík við Stein. Hann segði, at manningin á Eysturoyingi var sera glað fyri síðstu sigrarnar.

- Tað er sjálvandi altíð gott at vinna, men síðstu tveir sigrarnir hava verið betur at vunnið. Vit arbeiða nógv við okkum sjálvum, og vit eru sera væl nøgdir við róðurin hjá okkum, sum hann hevur verið tær síðstu ferðirnar, sigur Ludvík.

Fleiri ferðir hevur verið at hoyrt, at kappingin hjá 10-mannaførunum er einki serliga hørð, og at Eysturoyingur ikki fær nakra serliga kapping, men hetta vil Ludvík ikki hoyra talan um.

- Nei, eg eri als ikki samdur, tá fólk siga, at kappingin ikki er stór hjá 10-mannaførunum, tí Vestmenningur rør sera væl. Um aðrir bátar vóru við í kappingini hjá 10-mannaførunum, so ivist eg í, um teir høvdu megnað at komið fram við Vestmenningi.

### Gott fólk at taka við

Síðani Eysturoyingur bleiv gjørdur hava úrslitini verið sera góð. Manningarnar hava eisini verið avbera góðar, og tí er ikki so løgið, at Eysturoyingur hevur fingið so góð úrslit.

Tað er tó einki, sum bendir á, at Eysturoyingur ikki verður við at mynda oddin í føroyskari kapprógving næstu árini, tí felagið hevur nógv gott fólk at taka við, tá eldru menninir umborð á Eysturoyingi gevast, sigur Ludvík við Stein.

- Her er nógv gott fólk, sum rør í Runavík. Umborð á eysturoyingi eru fleiri mans, sum hava róð í nógv ár, og sum kanska fara at gevast skjótt, men hetta merkir ikki, at Eysturoyingur ikki fer at blíva við at vera í oddinum. Har eru nevniliga nógvir mans klárir at taka yvir umborð á Eysturoyingi, um nakar skuldi steðga. M.a. hava vit sterkasta 8-mannafarið í landinum í Runavík, tí Heiðabáturin hevur nevniliga eisini vunnið allar sínar róðrar í ár.

Vit spurdu eisini Ludvík,